Heilsumálaráðið

Dagfesting:	07-03-2023
Mál nr.:	23/00700-24
Málsviðgjørt:	-
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	23.02.2023

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15 í Tórshavn

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15 í Tórshavn.
Stk. 2. Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi vera 19 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar
Virksemið hjá Apoteksverkinum økist og broytist alsamt, og tí er ætlanin, at ein partur av hølunum hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15, á Hálsi í Havn, skulu umbyggjast.

Á Staravegi 15 húsast landsapotekarin við fyrisiting og framleiðslu.

Landsapotekarin er ovasti leiðari í Apoteksverkinum. Hann varðar av toyminum Klinisk farmasi, leiðsluskrivara og fyriseting og rakstri, sum fevnir um Fíggjardeild, KT deild, Innkeypsdeild, Tekniska deild, og Framleiðsluapotekið. Harumframt tey fýra apotekini: Norðoya Apotek, Eysturoyar Apotek, Tjaldurs Apotek og Suðuroyar Apotek.

Seinastu árini hevur Apoteksverkið arbeitt fyri at savna nakrar funktiónir fyri at fáa meira burturúr, og eitt av tiltøkunum er at flyta stápseindir frá Tjaldurs Apotekinum til Landsapotekaran á Staravegi.

Fíggjardeild, KT deild, Innkeypsdeild og Teknisk deild eru tvørfakligar deildir, sum veita tænastu til apotekini og til Framleiðsluapotekið.

Framleiðsluapotekið fevnir um Framleiðsludeildina, ið tekur sær av framleiðslu, skamtan og alivinnuni. Harumframt fevnir Framleiðsluapotekið um Góðskudeildina, ið millum annað tryggjar, at framleitt verður sambært galdandi leiðreglum, og at vørurnar lúka ásett krøv. Í Framleiðsludeildini verða upp í móti 200 ymiskar vørur framleiddar. Vørurnar fevna um alt frá húðrøkt, heilivági til fólk (humanan heilivág), djóraheilivági (veterineran heilivág), skamtaðum heilivági til umleið 1400 brúkarar, blandaðum viðgerðum til nýtslu á Landssjúkrahúsinum og mangt annað.

Ein støðug øking av fólkatalinum í Føroyum, herd krøv til góðskuskipanina (GMP), umsiting av nýggjum lógarkrøvum um medisinska útgerð, íverksetan av GDPR og umlegging av veitingum til sjúkrahúsini seta størri krøv til dagførd hølisviðurskifti, og við umbyggingini eru betri umstøður at húsa starvsfólkunum og til at gera arbeiðsgongdir smidligari og virknari enn í dag.

Tað verður eisini arbeitt við at gera eina virknari og bíligari heilivágsveiting til Sjúkrahúsverkið. Her er ætlanin m.a., at allar vørur, ið verða seldar til sjúkrahúsini skulu keypast frá tí sama veitaranum, sum sjúkrahúsini í Danmark keypa frá. Hesar vørur kunnu sambært sáttmálanum einans seljast til sjúkrahús, og tí fer avgreiðslan av hesum vørum at flyta til Framleiðsluapotekið á Staravegi í framtíðini. Hetta krevur pláss til nýggja avgreiðslu og goymslurúm.

Apoteksverkið roknar eisini við, at annað virksemið innan heilivág verður økt (sokallað klinisk farmasi), og er tí brúk fyri fleiri fundar- og undirvísingarhølum. Væntast kann, at framleiðslan av føroyskt framleiddum vørum til sølu á apotekunum og til útlendska marknaðin eisini økist.

Sum sagt er frá omanfyri er virksemið hjá Apoteksverkinum á Staravegi økt við fleiri starvsfólkum, umframt at KT deildin og Innkeypsdeildin í Tjaldurs Apoteki flyta niðan á Staraveg. Hetta setir krøv til fleiri og tíðarhóskandi høli.

Fyri at hýsa økta virkseminum á Staravegi, verður farið undir at umbyggja hølini. Umbyggingin ber við sær, at partur av goymsluhøllini verður gjørdur til tvær hæddir (dekk verður sett í). Á henda hátt verður økt um fermetratalið av gólvplássi. Í ætlanini ber soleiðis til at fáa nýggja avgreiðslu og goymslurúm, fleiri fundar- og undirvísingarhølir og umstøður at húsa starvsfólkunum við skrivstovum og felags matstovu.

Fleiri av átøkunum eru í samsvari við visjón 2016 fyri Apoteksverkið. Verkætlanin er mett at kosta 19 mió. kr., og ætlanin er, at verkætlanin skal vera liðug í 2024. Samlaða løguupphæddin fyri verkætlanina er 19 mió. kr. Ein mió. kr. er brúkt til fyrireiking, og verður samlaði kostnaðurin sostatt 20 mió. kr. Verkætlanin fevnir um umbygging av einum parti av bygninginum; sí tekning, ið er hjáløgd.

Apoteksverkið er landsfyritøka og verður krav sett um, at avlop skal vera á rakstrarjáttanini nøkur ár fram til at fíggja verkætlanina.

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið er gjørt fyri at fáa heimild at fara undir verkætlanina at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15.

1.2. Galdandi lóggáva
Eingin galdandi lóggáva er um at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegnum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegnum, soleiðis at rúm verður fyri øktum virksemi og starvsfólkum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur við sær, at Apoteksverkið kann rúma økta og broytta virkseminum og savna fleiri starvsfólk á einum staði.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið er gjørt í samstarvi millum Apoteksverkið og Heilsumálaráðið. Landsverk og Fíggjarmálaráðið hava síðani eisini verið partar í hesi tilgongd.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegnum fyri 19 mió. kr.

Apoteksverkið er landsfyritøka við rakstrarjáttan til virksemi. Samsvarandi játtanarskipanini verður løgujáttan brúkt í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiðir, sbr. § 22, stk. 1 í løgtingslógini. Hetta merkir, at løguverkætlanir upp á 10 mió. kr. ella meira skulu gerast við grundarlagi í einari verklagslóg. Hóast tað sostatt ber til at fíggja verkætlanina innan rakstrarjáttanina, eigur upphæddin at verða játtað á eini løgujáttan eins og størri løguverkætlanir skulu gerast við grundarlagi í einari verklagslóg. Ætlanin er tí at fáa gjørt eitt broytingaruppskot til fíggjarlógaruppskotið 2023, har játtaðar verða 6,5 mió. kr. til løgujáttanina hjá Apoteksverkinum, og at samsvarandi avlopskrav verður sett til rakstrarjáttanina hjá Apoteksverkinum.

Mett er, at samlaðu útreiðslurnar verða um 19 mió. kr., ið verða brúktar yvir 2 ár; 6,5 mió. kr. í 2023 og 12,5 mió. kr. í 2024. Samstundis verður eitt avlopskrav sett Apoteksverkinum samsvarandi upphæddini, ið verður játtað. Tað vil siga, at Apoteksverkið fær sett krav um at hava 19 mió. kr. í avlopi, sum vegleiðandi verður sett soleiðis: 6,5 mió. kr. í avlopi í 2023, 6,5 mió. kr. í 2024 og 6 mió. kr. í 2025. Samanlagt er talan sostatt um útreiðsluneutrala verkætlan, og tískil eru ikki útreiðslur fyri land ella kommunur.

Apoteksverkið hevur brúkt umleið eina mió. kr. til fyrireiking og prosjektering, og hevur verið arbeitt við fyrireikingini síðani á heysti 2021. Tørvur og krøv til hølini eru viðgjørd og eru viðmerkingar frá starvsfólkum eisini tiknar við í verkætlanina. Undir hesum var arbeiðið eisini boðið út. Tilboð komu inn í september í 2022, men av tí at ov long tíð er liðin, skal verkætlanin bjóðast út umaftur. Ætlanin er tí at bjóða arbeiðið út aftur fyrra hálvár í 2023. Roknað verður við, at tað tekur um 2-3 mánaðir at fáa tilboðini inn.

Apoteksverkið og Landsverk fara at gera samstarvsavtalu um skipan og stýring av verkætlanini. Samstarvið við tey projekterandi heldur ætlandi fram.

Fíggjarprofilurin verður mettur at verða soleiðis:

Apoteksverkið	2023	2024	Tilsamans
Staravegur	6.500 tús. kr.	12.500 tús. kr.	19.000 tús. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur tær umsitingarligu avleiðingarnar við sær, at nøkur starvsfólk fara at flyta frá Tjaldurs Apoteki niðan til Apoteksverkið á Staravegi. Harumframt verður roknað við, at framleiðslan og virksemið verður betri. Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar við sær fyri kommunalar myndugleikar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við sær fyri vinnuna, tó so at eftirspurningur verður eftir vørum og tænastum frá byggivinnuni komandi tíðina til verkætlanina.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í lógargreinini verður heimilað landsstýrismanninum at gera avtalur um at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15, á Hálsi í Havn. Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi vera 19 mió. kr.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Mælt er til, at verklagslógir galda 2 ár eftir mettu byggitíðina. Henda verkætlan verður mett at vera komin at enda í 2024, og verður gildistíðin fyri verklagslógina tí ásett til 1. januar 2027.

Heilsumálaráðið, 7. mars 2023

Margit Stórá
landsstýrismaður

/ Turid Arge

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Kostnaðarmeting
Fylgiskjal 2: Prosjekt